# Útibarnagarðurin Fjallafípan í Klaksvík

Søkt verður eftir 2 námsfrøðingum at byrja 1. februar 2006, ella eftir nærri avtalu.
Størvini eru 30 tíma vika. (Møguleiki er fyri fleiri tímum).

**Pedagogar, ið fáa prógv í februar eru vælkomnir at søkja.**

Útibarnagarðurin Fjallafípan er ein kommunalur stovnur við 55 børnum í aldrinum 3 til 7 ár.
Fjallafípan liggur í einum sera náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi tætt, við haga og fjøru.

**Vit søkja fólk ið:**
- taka børn í álvara og setur seg á støði hjá barninum
- hevur áhuga at vera úti í náttúruni saman við børnum
- duga at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar
- vil leggja dent at samstarva við foreldur, starvsfelagar og børn

Vit bjóða eitt starv, har viðkomandi sleppur at vera við at mynda arbeiði á stovnum og gerandisdagin hjá børnum.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 7. januar 2006.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Útibarnagarðin Fjallafípan**
v/ Jóhannu Vest · FO-700 Klaksvík
Tlf. 458415

# Jørð til sølu

Um nóg høgt boð fæst, er nógv jørð til sølu norðuri við Gjógv. Jørðin gevur rættuliga nógv útbýti, hevur ligið umleið 4 tøkuseyðir til gyllina ella gott og væl tað.

Markin er rættuliga stór, heilar 24000 m², liggur rættuliga sløtt í trimum pørtum.

Jørðin er á tveimum matrikklum 8 g á øðrum og 3½ g á hinum. Samanlagt eru til sølu 11½ gyllin.

Um áhugi er fyri søluni, kunnu tygum ella tit ringja á tlf. 423135 og biða um aðrar viðmerkingar.

**Eldri hús í Vági til leigu frá 1. nov. ella seinni**

**Ring 0045 22 96 18 52 ella 44 22 32. Helst eftir kl. 17.**

# Lýsing

## um matrikulering av trøðni á Drátti, matr. nr. 400 í Hvalba

Til tess at matrikul og tingbók kunnu verða rættað er neyðugt við eigindómsdómi.

Í hesum sambandi hevur Matrikulstovan vent sær til Vinnumálaráðið, sum í skrivi dagf. 27. apríl 2000 hevur givið Matrikulstovuni loyvi til nýmatrikulering av matr. nr. 400 í Hvalba sambært grein 38 í løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962.

Boðað verður tí til fundar í gamla skúla í Hvalba hósdagin 1. desember 2005 kl. 13.30 at viðgera málið um ognarrættin til trøðna.

Tá eigindómsskráin er fullfíggjað, verður matrikulin sendur Innlendismálaráðnum, ið við almennari stevning leggur sak við Føroya rætt móti øllum og einum, ið hava mótmæli móti tí gjørda matrikli, og at teir í honum lýstu eigarar verða skrivaðir í tingbókina sum eigarar av óheftum eigindómi.

Rættarmálið verður havt í rætti allar vanligar tingdagar, frá tí degi stevningin fyrstu ferð er lýst, og til stevnufreistin er farin.

Bygdaráðið í Hvalba skal velja tveir mans at hjálpa Matrikulstovuni at greiða eigindómsviðurskiftini.

Matrikulstovan, tann 14. november 2005

Øssur Á Midjord,
matrikulstjóri

## Sethúsaogn í Vági til sølu

ADVOKAT VIRKIÐ

Um hóskandi boð fæst, verður sethúsaogn í Vági seld.

Húsini, sum eru í tveimum hæddum, eru innrættað soleiðis:

Stovuhædd: Køkur og stova í einum, 3 kømur, baðirúm og vaskirúm.
Loft: 1 kamar.

Í kjallaranum eru handilshølir.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara.

SKRIVSTOVUSAMSTARV
ADVOKATVIRKIÐ
Páll Nielsen, adv. - Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. - Hans Trygvi Teirin, adv.

Skansavegur 1 · Postsmoga 85 · FO-110 Tórshavn
Tel 312171 · Fax 315874
e-mail: advokat@post.olivant.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Til sølu

## BMW 318d diesel



Árg. 2002 · km 83.000
Klima o.a. · Bilurin er sum nýggjur

**kr. 220.000,-**

LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING
**Bilfríðkan á Hjalla**
TEL 35 73 00 · FARTEL 21 73 00
sí meira á WWW.BILFRIDKAN.FO

# Til sølu

## Subaru Legacy 4x4 2,0



Árg. 6/99 · bert koyrt 37.000 km
***kr. 138.000***

Útgjald kr. 60.000,-
Restin kann fíggjast fyri 4% í rentu p.a.

LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING
**Bilfríðkan á Hjalla**
TEL 35 73 00 · FARTEL 21 73 00
sí meira á WWW.BILFRIDKAN.FO

# Handilslærlingur

**Vit sóknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv:**
FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

**Vit vænta at tú ert:**
Røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk.
Haraftrat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hettar er eingin treyt.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, fríggjadagin 16. desember 2005.

Eru spurningar, eru tygum altíð vælkomin at ringja á tel 31 20 00

**pf Maria Poulsen & Co.**
BOX 182 · FO-110 TÓRSHAVN

# FÓLKAFLOKKURIN

Landsfundur Fólkafloksins verður á Hotel Hafnia í Tórshavn leygardagin 26. november kl. 10.00.

Fólkaflokkurin